


## Húsavørður til Tórshavnar kommunuskúla

Tórshavnar kommuna søkir eftir einum húsavørði til Tórshavnar kommunuskúla. Talan er um eitt fastlønt starv.

**Arbeiðsøki**
- røkja bygningarnar og økið uttanum
- gera smærri umvælingar
- røkja el-, vatn-, hita- og sanitetvviðurskiftini
- røkja ventilatiónina
- hava bruna- og trygdarútbúnað í lagi

**Vit rokna við at tú**
- hevur handverkaraútbúgving sum húsasmiður ella líknandi.
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt og hevur góð samstarvsevnir við bæði børn og vaksin.
- hevur koyrikort.

Kommunan skipar fyri skeiðum í viðlíkahaldi av bygningum.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv og verður sett skjótast til ber. Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og fíggjarmálaráðið.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi hósdagin 4. oktober 2007. Merkið umsóknina „Húsaumsitingin".

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til leiðaran fyri Húsaumsitingina, Harald Bjørgvin, tlf. 30 20 10 ella skúlastjóran, Hanus Joensen, tlf. 30 25 80.

## Pedagogur til Stella Maris Vøggustovu

Søkt verður eftir einum pedagogi at arbeiða 25 tímar um vikuna, møguliga meira, at byrja skjótast til ber.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Stella Maris vøggustovu, Varðagøta 11, 100 Tórshavn í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 5. oktober 2007.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Kristinu Eldevig, tlf. 31 28 53 / 21 28 53.

## Reingerðarfólk til Hoyvíkar Skúla

Søkt verður eftir einum fólki til reingerð 4 tímar um dagin at byrja 1. oktober.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 28. september 2007.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Birgit Arge, skúlastjóra, á tlf. 30 25 90.

**Tórshavnar kommuna**

---

Frá Føroya Postfelag:

## Eykaaðalfundur 2007

Eykaaðalfundur verður fyri allar limir felagsins í B36-húsinum leygardagin, tann 22. september kl. 10.00

***NEVNDIN***

---

## AT. H & J

Søkt verður eftir 2 húsasmiðum til Danmarkar (Keypmannahavn), at byrja í okt. '07. Nógv arbeiði fyri framman. Til at hoyra nærri vinarliga ring til:

**André:** .................. +45 20 71 62 23

**Bragi:**..................... +45 20 71 62 24

---

## HEVUR TÚ EINA GÓÐA SØGU?

Vikuskiftisvaktin hjá

**SOSIALINUM & PORTALINUM**

er at hitta alt vikuskiftið á

**22 50 00**

Ringið um tit hava søgur, hugskot og tips ella um tit vilja kunna um fundir, tiltøk, konsertir o.a., sum fer fram kring alt landið í vikuskiftinum

